Frank Skytte:

# - Eg plagi at raka rætt



*HB-venjarin bæði vónar og væntar, at nýggju HB-leikararnir fara at styrkja um HB-liðið í ár*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Trýstið at vera meistaralið, og frágongdin av týdningamiklum leikararum, ger, at HB-venjarin metir eitt realistiskt mál hjá HB í ár er at royna at vinna sær evropeiska luttuku til 2004.**

LEIKARASKIFTI
*Páll Holm Johannesen*

Hetta var beinrakna svarið hjá venjaranum hjá HB, Frank Skytte, tá vit settu honum spurningin, um nýggju leikararnir í HB koma at vera í røðini av útlendskum leikarum, ið ikki sláa til í føroysku kappingini.

Eitt ótal av útlendskum leikarum hava verið í føroysku kappingini seinastu árini, og flestu teirra hava havt torført við at hækka um støðið í føroysku kappingini. Teir hava tvørturímóti forða ungum føroyskum leikaranum at sleppa framat á besta liðnum hjá feløgum kring landið.

Frank Skytte metir seg hava fingið røttu spælararnar, ið fara at styrkja um HB-liðið. - Eg havi havt danir í øllum feløgum, eg havi vant í Føroyum, og uttan at taka munnin ov fullan, so haldi eg sjálvur, at eg havi verið sera heppin í mínum valum av leikararum, sigur HB-venjarin við Sosialin.

Spælararnir Frank Skytte vísir á eru, Kim Christensen og Per Nielsen, sum vóru á TB-liðnum ávíkavist í 1982 og 1995, og Anders Nygaard, sum var á Toftum seinasta kappingarár.

### Verið venjari hjá Martin Christensen

Nýggja verjuleikaran í HB, Martin Christensen, hevur Frank Skytte áður vant í Holbæk, Glostrup og Kalundborg, og tí kennir HB-venjarin væl til dygdirnar hjá danska verjuleikaranum.

- Tað hava altíð verið góð viðurskifti okkara millum, og tí er onki løgið í, at eg vendi mær til hansara, tá HB nú manglaði verjuleikara, greiðir Frank Skytte frá.

Nýggi áleyparin, Carsten From, hevur Frank Skytte fingið viðmældan frá fyrrverandi danska landsliðsleikaranum, Kim Ziegler, ið gav honum góð skoðsmál.

- Eg kenni ikki líka væl Carsten, sum Martin, men at hann hevur verið tilknýttur einum superliga liði, og tað skuldi boðað frá góðsku, sigur HB-venjarin. Frank Skytte leggur afturat, at Carsten From skuldi verið ein fótbóltssvangur ungur maður, sum gleðir seg at fáa meira spælitíð, enn hann fekk í FC Midtjylland.

HB-venjarin ásannar, at báðir nýggju leikararnir skulu vísa nakað sum útlendskir leikarar í Føroyum, og hann ivast ikki í, at báðir fara at styrkja um HB-liðið.

Spurdur um Carsten From og Martin Christensen vóru seinastu nýggju nøvnini í HB, áðrenn kappingarárið í ár fer av bakkastokki, svarar Frank Skytte í stuttari viðmerking, at tað valdast um fíggjarligu viðurskiftinum í felagnum, og skoytir uppí, at HB framvegis hevur pláss fyri einum útlendskum leikara afturat, men tað formaðurin í felagnum, sum hevur seinasta orðið í tí spurninginum.

### Nýtt ættarlið í HB

Tá prátið kemur inn á kappingarárið í ár, sigur HB-venjarin, at hann vónar at fremja eitt ættarliðsskiftið í HB. -Tað eru einir 5-6 sera ungir og evnaríkir leikarar í HB, og eitt av málunum í ár, er at spæla nakra teirra inn á HB-liðið, sigur Frank Skytte. Hann leggur afturat, at meistaraliðið hevur tað vanliga sera torført, og við frágongdini av so royndum leikarum sum Hans á Lag og Johannes Joensen, so kann ein ikki at seta sær ov stórar vónir

- Fáa vit spælt nýggju leikararnir rímuliga skjótt inn á liðið, og nakrar av teimum ungu, so kundi eitt realistiskt mál verið at enda á onkrum pláss, ið gevur luttøku í evropeisku kappingunum, sigur Frank Skytte at enda.

# 21 av 29 málum

Í týsdagsblað okkara skrivaðu vit, at tey 17 málini, sum Áki Mørk skeyt fyri Neistan í dystinum móti KÍF var tað mesta, sum ein einstakur leikari hevði skotið hesi seinastu fýra kappingarárini. Eitt tal sum Áki Olsen eisini rakk á vári í 2000, tá Neistin vann heimadyst á Tjaldri.

Tíverri eru ikki nágreinulig hagtøl fyri hondbóltskappingini í árunum undan hesum, og tí ber ikki til at staðfesta, hvussu ofta slík máltogan er komin fyri.

Ein lesari hevur tó gjørt okkum varugar við, at tey 17 málini hjá báðum Ákunum ikki eru met í føroyskum hondbólti. Klaksvíkingurin Egil Johansen, sum í nógv ár var fastur fúsur hjá Stjørnuni, og sum eisini umboðaði Føroyar á A-landsliðnum, skeyt í 1977 21 av 29 málum, tá Stjørnan vann 29-22 á StÍF. Í grein í 14. september stendur um dystin, at Egil hevði 23 skotroyndir á máli, harav tær 21 fóru inn. Lagt verður afturat, at tær báðar ferðirnar, at Egil ikki fekk mál, rakti hann stongina, og í øðrum førinum støkk bólturin til viðleikara, sum síðani skoraði.

Egil Johansen var sambært greinini eisini besti málskjúttin í føroysku kappingini hetta árið, og í einum øðrum dysti megnaði hann at skjóta 18 mál fyri Stjørnuna.

**- jm**

# Venjarasamling

TÍÐINDASKRIV

Sunnudagin 2.mars 2003 skipar Fótbóltssambandið fyri venjarasamling fyri allar venjarar í bestu mansdeildini hjá øllum feløgunum saman við landsliðsvenjarunum Henrik Larsen og Jógvan Martin Olsen.

Endamálið við samlingini er, at venjarar fáa høvi til at greiða frá sínum fyrireikingum. Samstundis hava landsliðsvenjararnir møguleika fyri at greiða frá sínum hugsanum og arbeiðI við landsliðnum

Landsliðsvenjararnir koma at samskipa tiltakið og uml. 20. februar verður tann endaliga skráin send út til feløgini

Tað er umráðandi, at feløgini ikki leggja venjingardystir henda dagin, soleiðis at allir venjarar eru tøkir



LANDSVERKFRØÐINGURIN

## Fólk til vegadeildina

Søkt verður eftir dugnaligum og álítandi fólki til vegdeildina hjá Landsverkfrøðinginum at byrja 1. mars 2003 ella skjótast gjørligt.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir um, í summarhálvárinum at vera operatørur á bilinum, sum strípar landsvegirnar, umframt viðlíkahald av hesum bili og onnur arbeiði í samband við vegamerking. Merkingarliðið hevur støð í Hósvík.
Í vetrarhálvárinum skal viðkomandi luttaka í vetrarhaldinum í samband við graving, fráboðanum o.ø. fyrifallandi arbeiði.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal verða maskinsmiðjur, bilmekanikari ella hava líknandi útbúgving. Tað er ein fyrimunur, at umsøkjarin harafturat hevur stóra koyrikortið og hevur royndir við gravimaskinum.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars vera sambært avvarðandi yrkisfelag ella sambært avtalu. Roknast kann við yvirtíðararbeiði, serliga vetrarhálvárið.

**Umsóknir**
Umsóknir vera at senda Landsverkfrøðinginum, Postboks 78, 110 Tórshavn, og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 17. februar 2003. Merkið brævbjálvan »Fólk til vegadeildina«.
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast á tlf. 311333 og tosað við Niclas Danielsen.

## Pedagogar ella hjálparfólk

### til Sambýlið í Stoffalág 64 í Havn

**Innan Trivnaðarmálaráðið og stovnar undir tí, við tænastu inntil víðari á Sambýlinum í Stoffalág 64 í Havn er eitt pedagogstarv leyst til setan 1. mars 2003 ella eftir nærri avtalu.**

Starvið verður sett eftir sáttmálum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag fyri tænastumannasettar pedagogar, lønt eftir lønarstiganum 24-31 eftir lønaravtaluni frá mars 2002.

Sambýlið í Stoffalág 64 er eitt nýstovnað sambýlið, sum verður heim hjá fimm menningartarnaðum ungfólkum.

Arbeiðsuppgávurnar hjá starvsfólkunum verða at taka sær av íbúgvunum og øllum øðrum arbeiði í heiminum. Týdningur verður lagdur á, at umsøkjarar hava fakliga vitan og eru áhugaðir í at útbúgva seg meira. Hava góð samstarvs- og innlivingarevni, eru kroppsliga væl fyri og ikki bangnir fyri at taka tøk.

Bert fólk, sum hava lokið námsfrøðiligt prógv ella líknandi prógv verða sett sum pedagogar, men um ikki pedagogur verður settur, so verður starvið sett tíðaravmarkað við hjálparfólki, sett eftir hjálparfólkasáttmálanum.

Nærri fæst at vita um størvini frá Marjuni á Plógv, leiðara á telefon 314664. Umsóknarfreistin er 21 februar og skulu umsóknirnar sendast til:

**Sambýlið í Softalág 64**
Att. Leiðarin
FO-100 Tórshavn

## Aðalfundur

**Ársaðalfundur Starvsmannafelagsins verður leygardagin 22. februar 2003 kl. 13.00 í Havnar Klubba.**

**Skrá:**
1) Frásøgn formansins frá
   a) farna ári og
   b) virki felagsins framyvir.
2) Framløga av grannskoðaðum roknskapum til góðkenningar
3) Lógarbroytingar
4) Møgulig uppskot frá limum og nevnd
5) Ásetan av limagjøldum
6) Val av nevndarlimum og tveimum tiltakslimum
7) Val av roknskapargrannskoðara og tiltakslimi
8) Ymiskt.

Limir, sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, mugu senda nevndini hesi í seinasta lagi **leygardagin 15. februar 2003.**

**Starvsmannafelagið**

## Aðalfundur

**Ársaðalfundur í Eftirlønargrunni Starvsmannafelagsins verður beint eftir aðalfund Starvsmannafelagsins í Havnar Klubba 22. februar 2003.**

**Skrá:**
Frásøgn um virki grunnsins í farna roknskaparári.
Framløga av grannskoðaðum ársrokniskapi til góðkenningar.
Val av nevndarlimum.
Ymiskt.

Limir sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum møgulig lógaruppskot, mugu senda nevndini hesi í seinasta lagi **leygardagin 15. februar 2003.**

**Nevndin**

LG FØROYA BESTA VASKIMASKINA



- 7 ára garanti
- 7 kg trumla
- Digital stýring
- Skerm ið vísir resttíð
- Stillfør
- Stórt lúkuop

damor
Kviggjartún 3 • Argir • Tel. 315415 • Fax 319001

ER BILURIN

skitin
mattur
keðiligur



Fá hann sum nýggjan

Vit: *vaska *slípa *polera *forsegla

UTTAN OG INNAN

Vit viðgerða eisini stórar bilar og bussar

Ring og hoyr nærri !!

Føroya Bilshine
Bakkavegur 6
FO-625 Glyvrar
Tlf. 448934 · 228934

## Nissan Primera til sølu

Svartur Nissan Primera 2000 SE, árg. 97 til sølu.

Við leðurkabinu, teak instrumentbretti, el-setrum, el-speglum og el-rútum aftan og framman. Hevur sportfelgur, í sera góðum standi. Nýprísur 230.000, nú uml. 117.000.

Verð fyrstur við einum góðum boði.

**Ring á tlf. 0045 22 78 98 69**
(helst eftir kl. 20.00)

Ístaðin fyri at keypa nýtt



Vit lakera alt innbúgv, so tað verður sum nýtt.

Skápshurðar og innhurðar

Ein bíligari loysn

Auto-Tek
Argjaboðagøta 5 · Tlf. 321206 · fax 321236 eftir kl. 17.00 á Tlf. 221006

<ph_1>
<ph_1>
<ph_1>